gult cyan magenta svart





# FØÐINGAR

13. juni fingu Miriam og Niels Vang, Nuuk, Grønland, eina dóttir. Hon var 53 cm. long og vigaði 3460 gr.

20. juni fingu Malena Petersen og Jóhan Heini Heinesen, Viðareiði, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3900 gr.

23. juni fingu Rabeniaina og Árni Zachariasen, Klaksvík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4180 gr.

23. juni fingu Jonny og Oddmar Kruse, Tórshavn, eina dóttir. Hon var 49 cm. long og vigaði 2280 gr.

23. juni fingu Sigrid og Mikkjal Thomassen, Tórshavn, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4150 gr.

25. juni fingu Torbjørg Hentze og Jógvan Krog Mortensen, Argir, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3950 gr.

25. juni fingu Anja Joensen og Poul Poulsen,Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4220 gr.

25. juni fingu Oluva Samuelsen og Virgar Fagraklett, Haldórsvík, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 3750 gr.

26. juni fingu Heine og Filip eina lítla systur, hon var 54 cm. long og vigaði 3720 gr. Foreldur teirra eru Marian og Niels Pauli Winthereig og tey búgva í Møldrup.

28. juni fingu Helga og Tróndur Lyngvej, Hestur, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 4100 gr.

29. juni fingu Adam Grew og Steinvør Sigurðsdóttir Simonsen, Fuglafjørður, ein son. Hann var 55 cm. langur og vigaði 3900 gr.



# ANDLÁT

23. juni
**Olivia Petersen,** Lilla, Húsar, 90 ár
**Ingrid Petersen,** Tórshavn, ættað úr Sandavági
24. juni
**Ragnar Ørvarodd,** Sandur, 52 ár
**Gunnhild Midjord,** Tórshavn, 87 ár
**Annika Gulklett,** Nólsoy
27. juni
**Ellingsgaard Hansen,** ættaður úr Sørvági, bús. í Vági, 65 ár
**Birgi Petersen,** Tórshavn, 68 ár
**Elisa Malena Víká,** Leirvík, 96 ár



# *Eitt ljós á gøtu míni*



## Ljóstíðin og børn ljósins

***Jóhs. 12,36:***
*»Meðan tit hava ljósið, tá trúgvið á ljósið, til tess at tit mega verða børn ljósins«.*

»Guð, tú sum ljósið lætst skína so bjart,
sjálvur ert ljóskeldan reina…«

syngja vit í einum morgunsálmi, og tað hava vit nú í longri tíð av fullum huga kunnað tikið undir við, og enn eina tíð hevur ljósið so stórt vald, at vit tala um summar, hvussu veðrið enn skikkar sær.

Jesus talar um seg sum ljósið, og tað við góðum rætti. Tí bæði er hann frá Guði, ljóskelduni og so vita vit, at hann hevur lýst so væl upp, meðan hann gekk her á jørð og hevur gjørt tað til hendan dag.

Og hann er eisini hin glaði boðskapurin, hansara orð og gerningur lýsa so væl, at tey, sum trúgva tí, ongantíð ganga í myrkri,

»aldri seg nærkar tær myrkrið so svart,
sólin har vald hevur eina…«

Líta vit kring okkum, so er so ómetaliga nógv gott at síggja hesa tíðina, bæði í náttúru og millum menniskju. Øll vilja líkasum vera við til at seta dám á og spreiða gleði.

Tann, sum trýr á Jesus, er barn ljósins, og Jesur tekur einastaðni til »tit eru ljós heimsins«. Jú, vit vita um tey, sum vóru tað og vóna, at tey leggjast afturat, sum fara at verða tað, soleiðis at lívssólin, Jesus alsamt ger um seg millum menniskju.

*kj.m.*



# KIRKJUR & SAMKOMUR

## 2. sunnudagur eftir Trinitatis

*Vesturkirkjan:* kl. 11, Bergur D. Jeonsen, altarg.
*Havnar kirkja:* kl. 11, Sonja Klein
*Kaldbak:* kl. 12, altarg., Elsa Funding
*Miðvágur:* kl. 11 *konfirmatión*, Emil Olsen
*Kvívík:* kl. 12, Marjun Bæk
*Kollafjørður:* kl. 11, Martin Restorff Jacobsen
*Oyndarfjørður:* kl. 12, altargangur, Jógvan Fríðriksson
*Fuglafjørður:* kl. 11, Uni Næs (Gentukórið hjá Danmarks Radio syngur)
*Rituvík:* kl. 11, altarg., Jónsvein Bech
*Vesturkirkjan:* kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
*Skálavík:* kl. 12, Jákup R. Hansen
*Sumba:* kl. 12, Petur M. Rasmussen
*Tvøroyri:* kl. 11, Ólavur Rasmussen
*Viðareiði:* kl. 11, Meinhard Bjartalíð

## Ebenezer

Sunnudagin kl. 18 evangeliskt møti, kl. 21 útimøti.

## Hvítusunnusamkoman Yviri við Strond

Morgunmøti kl. 11, kl. 18 evangeliskt møti.

## Filadelfia, Landavegur 22

Í dag kl. 06 morgunbøn, kl. 21 ungdómsmøti, í morgin kl. 06 morgunbøn, kl. 17 landsbøn.

Sunnudagin kl. 06 morgunbøn, kl. 11 morgungudstænasta, kl. 18 møti v/italiu-
outreachbólkinum, kl. 22 útimøti á Vaglinum.

## Meinigheitshúsið í Havn

Sunnudagin kl. 18 møti v/Símun Joensen frá Kafé Blákrossstovuni.

Týsdagin kl. 20 Bíbliutími við Petur Steingrund. Evni: Søguligt yvirlit yvir Nýggjatestementið.

## Frelsunarherurin í Havn

Leygardagin kl. 11 útimøti.

Sunnudagin kl. 11 møti, kl. 18 møti.

## Rhema á Hálsi

Sunnudagin kl. 11 møti, Poli Jacobsen talar.

Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 06. Øll eru vælkomin.

## Meinigheitin í Hoyvík

Sunnudagin í Hoyvíkar skúla kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti við Svenhild Haraldsen og øðrum kvinnum. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Saron, Vestmanna

Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.

Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti.

## Hvalvíkar Missiónshús

Sunnudagin kl. 18 møti við Martin R. Jacobsen. Øll eru vælkomin.

## Missións- og ungdómshúsið á Glyvrum

Møti verður sunnudagin kl. 19. Húsakórið syngur.

## Ørkin, Saltangará

Møti verður sunnudagin kl. 16 í Arbeiðsmannafelagshúsinum Hæddini í Saltangará, Jónsvein og Marcella frá U.M.O. luttaka.

Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Eydnu og Jan Joensen, Saltangará.

Hósdagin kl. 20 bønarmøti.

Morgunbøn er mána-, miku- og fríggjamorgun frá kl. 6-7.

## Keldan, Skálafirði

Fríggjadagin kl. 20.30 vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi, øll kunnu vera við.

Leygardagin opið hús kl. 21.

Sunnudagin kl. 19 møti við ymiskum luttakarum.
http://www.keldan.fo

## Missiónshúsið í Skopun

Sunnudagin 2. juli kl. 18.30 lovsangur kl. 19 møti.

## Missiónshúsið á Tvøroyri

Sunnukvøldið verður møti kl. 18 við John og Tove Hammer. Innsavnan verður til húsið. Øll eru hjartaliga vælkomin.

## Betel, Vágur

Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 18 evangel. fundur, kl. 21 útifundur.

Mánadagin kl. 20 bønarfundur.

Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

## Samkoman, Sion Vági

Sunnudag: Morgunmøti kl. 11.00, kl. 11.30: Sunnudagsskúli. Evangeliskt møti kl. 18.00.

Telefonandaktin svarar á 373777.

## Frá 1000 ára haldinum

Framsýningin hjá J. P. Gregoriussen, arkitekti um kirkjurnar í Føroyum verður í kjallaranum í Býráðshúsinum í Fuglafirði frá 1. juli kl. 17 til 7. juli.

# Prógv

**Jørmann Petersen, Sandavági, fekk tann 22. juni prógv sum civiløkonomur (HA-Almen) á mercur-centret í Nykøbing Falster.**

**Hans Olsen, Klaksvík, hevur lokið yrkisútbúgving sum timburmaður. Læarupláss: Klaksvíkar Byggivirki.**

**Johannis Johannesen, Argir, hevur lokið yrkisútbúgving innan heilsølu (telelutir). Læarupláss: Føroya Tele.**

**Andrias Eyðstein Skipanes, Skipanes hevur lokið yrkisútbúgving sum bygningssnikkari. Læarupláss: Byggi-Service, Skáli.**

**Páll Lamhauge, Lambi, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læarupláss: Bilfríðkan, Tórshavn.**

**Gunnar Flóvin Olsen, Tórshavn, hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læarupláss: Meinhardt Arge, Tórshavn.**

**Birgir Olsen, Skáli, hevur lokið yrkisútbúgvin sum bilmekanikari. Læarupláss: F.J.M. Runavík.**

**Heðin Kristian Weihe, Tórshavn hevur lokið yrkisútbúgving sum bilmekanikari. Læarupláss: Meinhardt Arge, Tórshavn**

**Øssur Højgaard, Runavík, hevur lokið yrkisútbúgving sum maskinsmiður. Læarupláss: F.J.M. Runavík.**

# 80 ár

**Týsdagin 4. juli verður Lotta Hjelm, Vágur, 80 ár. Dagurin verður hildin hjá Massi.**

# Silvurbrúdleyp

**Tann 9. august hava hjúnini Oddbjørg og Anton Øster, Tvøroyri, sivlurbrúdleyp. Dagurin verður hildin 5. august kl. 19 í høllini í Trongisvági.**

**Tey, sum vilja gleða okkum henda stóra dag verða biðin um at siga frá í seinasta lagi 1. juli á tlf. 371194 ella 371094. Til ber eisini at senda teldupost til moester@post.olivant.fo**

**Týsdagin 15. august hava hjúnini Sigrun og Eivind av Reyni silvurbrúdleyp. Dagurin verður hildin leygardagin 19. aug. kl. 18 í bilhøllini á Reyni Service.**

**Tey, ið vilja gleðast við teimum henda stóra dag, verða biðin um at siga frá áðrenn 5. august á tlf. 313040.**

# Læknavaktir

**Tórshavn:**
*Læknavaktin* tlf. 310033.

**Eysturoy:**
*Leygardagin 1.7.:*
Knud Jacobsen, tlf. 423006
*Sunnudagin 2.7.:*
Hálvdan Simonsen, tlf. 441490

**Norðoyggjar:**
*Leygardagin og sunnudagin:*
Jaspur Petersen, tlf. 456400

**Vágar:** tlf. 332413

**Suðuroy (norður):**
Tlf. 371560

**Suðuroy (suður):**
Tlf. 373030

## Tannlæknavakt, Tórshavn

Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13–14. Tlf. 314544.



# Starvsfólk til Føroya Tele - Sandoy

Søkt verður eftir einum telebúðar/skrivstovufólki hálvan dag til Føroya Tele, Sandoy, at byrja skjótast til ber. Fyrstu tíðina verður tó arbeitt á ymiskum deildum í Havn.

Arbeiðið er í stóran mun søluarbeiði og skráseting.

Vit kunnu bjóða eitt áhugavert starv við serligum atliti til:
- sølu av vanligum teleútbúnaði
- vekslarar
- teleterminalar av ymiskum slag
- internet og ISDN
- fartelefonir
- at ráðgeva kundum um felagaútgerð og tænastur

Arbeiðsupgávurnar eru:
- Søla av teleútbúnaði
- Goymslustýring
- Telefonavgreiðsla
- Bókingar og skráseting í telduskipanunum
- Annað fyrifallandi arbeiði

Krøv til starvsfólkið:
- At tú hevur handilsroyndir
- At tú hevur teldukunnleika innan m.a. tekstviðgerð og bókhald
- At tú ert fyrikomandi og léttur/létt at samstarva við
- At tú kanst arbeiða sjálvstøðugt
- At tú ert opin og dugir at samskifta við viðskiftafólk
- At tú ert ágrýtin og næmur/nom

Útbúgving: Kramba-/skrivstovuútbúgving og/ella royndir innan yrkið.

Løn sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag.

Áhugaði kunnu venda sær til Hanus Klementsen á tel. 361000 ella Sunbjørt Petersen á tel. 303030 lokal 3322.

Umsóknir við avriti av prógvum o.ø. skulu verða starvsfólkadeildini í hendi í seinasta lagi mánamorgun 10. juli 2000 og skulu sendast til

FØROYA TELE
Tel 30 30 30 · Fax 30 30 31 · www.tele.fo
*Føroya Tele er skrásett hjánavn hjá P/F Telefonverkið · Reg. no. 2697*

SANSIR · TEL 355 355

Føroya største úrval av
**PAKKITILFARI**
úr karton, bylgjupapp og plast innan øll vinnuøkir

Vit útvega eisini:
* Plastbakkar
* Pakkibond, tape
* Merkir, etikettir
* Knívar
* Kitlar, húgvur, handskar, svintur o.l.
* Ymisk tól til ídnaðin
* Reingerðisevnir
* Tilsetningsevnir
* Plattar
* Ráðgeving í tilevning av pakkitilfari

*...sjálvandi til besta prísin!!*

FARPACK

*Staravegur 5, P.O. Box 3099*
*FO-110 Tórshavn*
*Telefon +298 35 30 00*
*Fax +298 35 30 10*
*E-mail: farpack@farpack.com*

# Pedagogur

Verkstaðið Vón søkir eftir pedagogi at arbeiða ½ tíð (20 tímar um vikuna), at byrja arbeiði 1/9-2000 ella skjótast tilber. Setan er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið. Lønarflokk 11/17 lønarstig 16-26, eisini verður veitt ein ikki eftirlønargevandi viðbót.

Verkstaðið Vón er ein vardur verkstaður, har gott 40 lættari menningartarnað millum 18 og 76 ár arbeiða. Høvuðsendamálið hjá stovninum er at tilrættisleggja dagligdagin so, at menning, lívsvirði og tryggleiki hjá tí einstaka eru í hásæti.

Tann, ið settur verður, fær ábyrgdina av einum bólki av vaksnum menningartarnaðum við serligum tørvi á stuðli, so tey betur kunnu luttaka í framleiðsluni á verkstaðnum.

Umsøkjarin skal duga at arbeiða við menningartarnaðum og
- skal duga at samstarva
- skal møta væl upp og vera álítandi
- skal vera áhugaður í at seta í verk tiltøk, sum virka fremjandi fyri tann einstaka og fyri stovnin sum heild.

Vilt tú vita meira um starvið ert tú vælkomin at ringja til leiðaran Maud Wang Hansen á tlf. 314288 ella 216288.

Umsókn við prógvi og møguligum viðmælum verður send til Verkstaðið Vón, Hóvabrekka 1, 160 Argir, att.: Leiðarin, í seinasta lagi 1/8-2000.

Um eingin pedagogur søkir verður hjálparfólk sett í staðin.

**Verkstaðið »Vón«**
Tlf. 314288 · Fax 315329
Hóvabrekka 1
Postsmoga 2003 · FR 165 Argir
E-mail: von@post.olivant.fo

# Starv

## Ferðaseðlasamskipari

Ein av stóru avbjóðingunum hjá Strandfaraskipum Landsins er at hækka tænastu- og góðskustøðið innan fólkaflutningin. Í hesum sambandi verður søkt eftir einum ferðaseðlasamskipara (M/K) til fólkaflutningsdeildina – Oyggjaleiðir og Bygdaleiðir.

Tað er ynskiligt, at tann, sum settur verður, kann byrja skjótast gjørligt.

### Uppgávurnar hjá fólkaflutningsdeildini

Fólkaflutningsdeildin skal veita eina úrslitagóða fyrisiting innan fólkaflutningstænastu, herundir samskipa, viðlíkahalda og menna stýringina innan fólka- og akfarsflutningin hjá fyritøkuni.

Virksemið á deildini fevnir um hesar høvuðsfunktiónir:

- Planlegging
- Rakstur (skip og bussar)
- Ferðslusamskipan
- Ferðaseðlasamskipan

### Uppgávurnar hjá ferðaseðlasamskiparanum

Ferðaseðlasamskiparin skal tryggja eina effektiva tilrættalegging og samskipan av ferðaseðlaskipanini á Bygdaleiðum og Oyggjaleiðum.

Uppgávur hjá samskiparanum verða m.a.:
- Samskipa, stýra og hava eftirlit við dagligu ferðaseðlasøluni
- Umsita sentralu edv-skipanina »Buscom«
- Umsita viðlíkahald og umvælingar av ferðaseðlamaskinum
- Gera regluligar frágreiðingar um virksemið innan ferðaseðlaskipanina
- Upplæring í ferðaseðlasølu, herundir nýtslu av Buscom-maskinum
- Innan- og uttanhýsis samstarv og samskifti.

### Førleikakrøv

- Útbúgving innan umsiting, fyriskipan, handil e.l.
- Áhugi og royndir innan kunningartøkni
- Kunnleiki og royndir viðvíkjandi flutningsskipanum er ein fyrimunur
- Málrættaður
- Góðan røkjuskap
- Góð samstarvsevni

Góð evni at orða seg bæði skrivliga og munnliga á føroyskum, donskum og enskum.

### Setanartreytir

Talan er um eitt starv við spennandi avbjóðingum, har ferðaseðlasamskiparin skal vera við til at víðari menna hesa funktión. Starvið gevur góðar møguleikar fyri persónligari og fakligari menning.

Vakt eftir vanliga arbeiðstíð.

Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálastýrið og avvarðandi fakfelag.

### Umsóknir

Umsókn við próvskjølum skal sendast til:

***Strandfaraskip Landsins***
att. Starvsfólkadeildin
Boks 88
FO-110 Tórshavn

og skal vera fyritøkuni í hendi í seinasta lagi 17. juli 2000.

Um tú ynskir nærri upplýsingar, kanst tú ringja til Hera Joensen, deildarleiðara, á tlf. 343000 ella e-postur: hej@ssl.fo.

STRANDFARASKIP LANDSINS

*Strandfaraskip Landsins er ein landsfyritøka undir Vinnumálastýrinum/Samskiftisdeildini.*

*Høvuðsuppgávan hjá fyritøkuni er at lúka landsins tørv á innanlands fólka- og farmaflutningi, og skal fyritøkan í so stóran mun sum gjørligt rekast á handilsligum støði. Fólka- og farmaflutningurin setir stór krøv um eina góða kundatænastu, herundir trygd, reglusemi og skjótleika.*

*Árliga rakstrarætlanin hjá Strandfaraskipum Landsins javnvigar við yvir 100 mió. kr. Talið á starvsfólkum svarar til 180 fulltíðarstørv, herav umleið 155 operatørar. Talið á flutningsanleggum er 12 skip, 40 bussar og 15 lastbilar. Flutningsuppgávurnar fevna um alt landið.*

*Halt* sosialin